# Jens Marni liðugur í Popstars



*TV2 hevur fylgt luttøkuni hjá Jens Marna Hansen í donsku sangkappingini Popstars*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Føroyski sangarin kom millum 25 tey bestu av 1200 luttakarum og er væl nøgdur við sítt avrik**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Jens Marni Hansen er nú liðugur í donsku sangkappingini Popstars.

Týsdagin fekk hann boð um, at hann verður ikki millum tey seinastu 10 fólkini frá umfarinum í Keypmannahavn, sum fara víðari í kappingini.

- Eg havi ikki droymt um at vinna hesa kappingina, men eg hevði vónað, at eg kundi koma eitt stig longur. Tá tað er sagt, so eri eg sera væl nøgdur við, at eg eri komin so mikið langt, sigur Jens Marni Hansen.

- Eg fekk at vita, at tað er einki galið við talentinum hjá mær, men tey halda, at eg gjøgnum fleiri ára royndir havi funnið mín egna stíl, og tí verður tað trupult hjá teimum at forma meg av nýggjum, sigur hann og heldur, at tað kanska eisini hevur nakað at gera við, at hann er vorðin 27 ára gamal og at sóknast verður eftir einum yngri sangara.

## Hørð kapping

Tað er danska sjónvarpsstøðin TV2, sum fer at senda Popstars. Hugskotið er at skipa fyri eini opnari sangkapping millum danir. Hetta er gjørt eina ferð áður, og tá var úrslitið diddubólkurin eyeQ. Nú leitar TV2 eftir einum solisti, sum kann vænta sær plátusáttmála við stórt plátufelag.

Tvey umfør hava verið hildin í Danmark. Annað var í Keypmannhavn og hitt í Århus. Eini 2000 fólk hava samanlagt roynt seg í kappingini.

Jens Marni var við í Keypmannahavn, har tað vóru 1200 fólk, sum bjóðaðu seg fram.

Fyrst skuldu 50 fólk veljast burturúr stóru rúgvuni, og eftir at Jens Marni hevði sungið Angels, var hann valdur sum ein av teimum.

Í næsta umfari sang Jens Marni sangin Lovin' Each Day, og enn einaferð eydnaðist honum at koma víðari, tá helvt var send víðari í kappingini.

Síðani var uppgávan at syngja eina duett saman við einum konufólki, og her sang Jens Marni Don't Look For Love.

Hesa vikuna gjørdist tað so greitt, hvørji 10 av teimum 25, sum vóru eftir í Keypmannahavn skuldi víðari, og her varð Jens Marni sílaður frá.

Nú skulu tey 10 fólkini í Keypmannahavn kappast saman við teimum seinastu 10 fólkunum úr Århus. Endin verður, at ein sangari verður valdur burturúr sum vinnari.

## Málið var ikki at vinna

TV2 hevur fylgt Jens Marna gjøgnum kappingina, og tí verður ivaleyst eitt sindur at síggja til hann, tá TV2 fer at senda sendirøðina í heyst.

- Mítt mál var ongantíð at vinna kappingina, men at bjóða meg fram og kanska gera vart við meg við einum góðum úrsliti, sigur Jens Marni.

Kollfirðingurin heldur, at skuldi hann ynskt sær meira í kappingini, so var tað at koma millum tey einastu 20 sangararnar, men tað skuldi ikki vera.

- Hetta hevur verið bæði stuttligt og spennandi. Eg haldi, at føroyingar skulu als ikki halda seg aftur, tá tað ræður um slík tiltøk. Vit kunnu saktans vera við, og eg vóni, at onkur kann brúka mínar royndir í hesi kappingini til okkurt, sigur Jens Marni.

Jens Marni hevur sín egna tónleikabólk, sum hann spælir til dans saman við. Hann skal spæla nógv í summar, men spurningurin er so, hvat kann henda hjá honum, tá TV2 fer at senda Popstars í heyst.

# Týr á konsertferð

**Bólkurin við kvæðarockinum skal spæla í Føroyum, Danmark og í Noregi í summar**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Rockbólkurin Týr skal í summar hava fleiri konsert heima og uttanlands.

Bólkurin var fyrr í ár í Íslandi og spældi á konsertum har, og nú sleppa teir eisini at royna seg í Danmark og í Noregi.

Farna vikuskiftið spældi Týr á útikonsert í Runavík, og fríggjakvøldið spæla teir í Vestmanna. 13. juli spæla teir í Hvalba, og 3. august eru teir ein av bólkunum, sum skulu spæla á stóru listastevnuni.

Tíðliga í august mánaði skal Týr spæla í Keypmannahavn, og her er upp á tal, at teir skulu spæla á kenda spælistaðnum Loppen.

Í oktober skulu teir til Oslo at spæla, og møguliga skulu teir spæla á fleiri konsertum í Noregi.

Umframt hesar konsertir verður arbeitt við fleiri konsertum í Íslandi, eins og ferðir til Svøríkis og Finnlands kunnu koma upp á tal seinni.

Í Býin

Hafnia Lounge
· Stórt úrval av kaffi
· Dagsins køka
· Sandwich
· Flógv terta við salati
· Ymisk "snacks"
· Smyrjibreyð frá kl. 14-17
(aftaná kl. 17 eftir áheitan)
Upplatingartíðir
Sunnudag - hósdag
Opið kl. 14.00-24.00
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 14.00-01.00
Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50

fríggjakvøldið 21/06
DJ Ottar í Funningstovu
Konufólk ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
TILBO : sí www.platform.fo
leygarkvøldið 22/06
DJ Rúni Jákupsson & Høgni Zachariasen
PLATFORM
discoteque
sí www.platform.fo
petur & petur • 320870

Øll hava eina góða síðu – vit hava pop.fo
Pop.fo er ein fesk síða við tónleiki og undirhaldi, sum hevur fleiri túsund vitjandi um mánaðin
Fylg við hvat er heitt & feitt – vitja pop.fo



Í Býin

Sundalagsstevnan
all:that:rain
spæla í bygdarhúsinum í Hósvík
fríggjakvøldið 21. juni kl. 23.00
Skipað verður fyri busssambandi hetta kvøldið,
tilmelding á telefon í Tórshavn 223311.
Koyrt verður av Steinatúni kl. 22.30
Vestmanna Náttarbussurin á tlf 424254 ella 286254
Bussarnir koyra heim aftur eftir dansin

Casablanca
Ristorante
Frá kl: 17:00
Bar-B-Cue
Oksakjøt, Lambskjøt, Kalkun, Kyllingur, Pylsir, Exotiskar sósir, Ymiskar dressingar, Grønmeti, Salatir, Bakaði epli, Pommes frittes, Rís
Veljið sjálvi, og lat Okkara kokk steikja tað.
ET TAÐ TÆR LYSTIR
BERT 98,-
Bíleggið borð á tlf 319696

Kaggin
Hóskvøldið
Rókur Jacobsen & Danjal á Neystabø
í vikuskiftinum spæla
Express
www.kaggin.to
Sosialurin - 311820

Felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
Flúrar
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Týskvøldið 25. juni
sjavskapping kl. 19.00
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

HESA VIKUNA
Hóskvøldið
LIVE tónleikur
De Ja Vu
Happy Hour frá kl. 21.00 til 22.00
Ókeypis atgongd
Fríggjakvøldið
DJ Martin Kjærbo
ladies night & Happy Hour til kl. 23.00 -01.00
Leygarkvøldið
DJ Eyðfinn Drewsen
Fótbóltur á stórskíggja
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur
v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 21. juni
• Fimmari
UNDIRHALD
Leygardagin 22. juni
• Opið frá kl. 22.00
Dansur frá kl. 24.00 til 04.00
við "PLÁTUVENDARA"

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

fk Matseðilin
Hósdagin 20. juni:
Urtagarðsgrýta
Fríggjadagin 21. juni:
Beef steak
Leygardagin 22. juni:
Fleskasteik
Mánadagin 24. juni:
Kjøtfrikadellur
Týsdagin 25. juni:
Revelsbein
Mikudagin 26. juni:
Royktur medistari
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 23,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík

Í Býin
- hvønn hósdag